# Varðarnir á dvd

## Filmurin "Tríggir varðar", um William Heinesen, Christian Matras og Heðin Brú fæst nú í dvd-útgávu

Randi Jacobsen

I 1977 gjørdu Eyðun Johannessen og Roland Thomsen filmin "Tríggir varðar".

Tíðin er farin frá av vísa smalfilmar, og tí fann Roland Thomsen uppá at spæla filmin yvir á dvd.

Í filminum eru søguliga nóg verdar samrøður við høvundarnar William Heinesen, Christian Matras og Heðin Brú.

Filmurin varð í sínari tíð vístur á fleiri sjónvarpsstøðum og varð væl móttikin.

Mentamálaráðið hevur keypt 20 eintøk til undirvísingarnýtslu.

Filmurin fæst annars í bókasølunum.

Í 1973 góvu teir út filmin "Se nu Færøerne", og Roland Thomsen fer nú at kanna, um áhugi er fyri at fáa hendan filmin yvir á dvd.

Eisini hesin filmurin fekk góða móttøku, og í 1975 var hann vístur á filmsfestivali í Pollandi.

Ein triðja film gjørdu teir um Niels á Botni, sum stappaði fuglar út. Roland Thomsen heldur, at hesin siðsøguliga má hava áhuga.

Yngri fólk kenna neyvan Roland Thomsen.

Hann er dani, buði í Føroyum frá 1964 til 1977, í Grønlandi frá 1977 til 200, og nú býr hann í Danmark.




*Roland Thomsen flutti úr Føroyum í 1977 men hevur varðveitt áhugan fyri føroyskari mentan og list*

*Mynd Jens Kristian Vang*



## *Hóvasták um ein papageyk*

*Uppgávurnar hjá vakthavandi á løgreglustøðini í Havn kunnu vera rættiliga ymiskar. Í vikuskiftinum snúgva tær seg ikki bara um húsaófrið, herverk, full fólk á gøtuni ella í bili*

Seinasta fríggjadag fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at ein deyður papageykur var funnin við Hotel Føroyar.

**Var hetta ein tamur papageykur?**
- Ja, alt bendir á, at papageykurin er rýmdur úr onkrum búri, tí hann var ringmerktur. Men úti í tí fría hevur hann ikki havt eydnuna við sær, tí nú varð hann altso funnin deyður.

**Kemur fyri, at fólk ringja um slíkt sum ein deyðan papageyk?**
- Ja, fólk kunnu nevniliga finna upp á at ringja um næstan alt millum himmal og jørð.

**Fóru tit so á staðið at kanna viðurskiftini rundan um papageykin?**
- Vit bóðu tann, sum hevði funnið fuglin, venda sær til Djóraverndarfelagið, men sum skilst, hevði eingin sett seg í samband við felagið, tí papageykurin varð saknaður, segði vakthavandi á løgreglustøðini í Havn fíggjakvøldið.

*vilmund@sosialurin.fo*

## Í MORGIN




Hvassur vindur ella skrið av útsynningi, eitt skifti møguliga stormur. Seinnapartin minkar hann vindin nakað. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 7 og 10 stig.

## MIKUDAGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinnapartin upp í hvassan vind av vestri. Ælingur, sum frálíður kavi og hitin millum 1 og 4 stig.

## HÓSDAGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og sólglottar,, men eisini ælingur, partvís kavi og hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Strúkur í vindi av vestri og útsynningi og lítið ella einki avfall. Sólglottar og hitin millum 5 og 9 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 985 hPa. skamt í landnyrðing úr Føroyum fer í landnyrðing og grynnist.




**Komandi nátt:**
Stormlágtrýstið í útsynning vestan úr Føroyum fer spakuliga í landnyrðing og gevur nógvan vind – møguliga storm á okkara leiðum.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 88 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **Tromsø** | -1 | **Moskva** | -13 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -2 | **Berlin** | -6 | **Beijing** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 20 |
| **Lerwick** | 4 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 15 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 7 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 11 | **Sydney** | -- |
| **London** | 8 | **Helsinki** | -19 | **Malorca** | 15 | **New York** | 2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

26. mars – Seinna kvarter
2. apríl – Mánin longst frá jørðini
3. apríl – Tendring

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. apr | 06:04 | 18:23 | 05:04 | 17:23 | 05:19 | 17:38 | 08:04 | 20:23 | 09:04 | 21:23 | 04:19 | 16:38 | 03:19 | 15:38 | 06:19 | 18:38 | 07:19 | 19:38 | 05:49 | 18:08 | 07:04 | 19:23 |
| 2. apr | 06:43 | 19:04 | 05:43 | 18:04 | 05:58 | 18:19 | 08:43 | 21:04 | 09:43 | 22:04 | 04:58 | 17:19 | 03:58 | 16:19 | 06:58 | 19:19 | 07:58 | 20:19 | 06:28 | 18:49 | 07:43 | 20:04 |
| 3. apr | 07:22 | 19:41 | 06:22 | 18:41 | 06:37 | 18:56 | 09:22 | 21:41 | 10:22 | 22:41 | 05:37 | 17:56 | 04:37 | 16:56 | 07:37 | 19:56 | 08:37 | 20:56 | 07:07 | 19:26 | 08:22 | 20:41 |
| 4. apr | 07:59 | 20:18 | 06:59 | 19:18 | 07:14 | 19:33 | 09:59 | 22:18 | 10:59 | 23:18 | 06:14 | 18:33 | 05:14 | 17:33 | 08:14 | 20:33 | 09:14 | 21:33 | 07:44 | 20:03 | 08:59 | 21:18 |
| 5. apr | 08:37 | 20:56 | 07:37 | 19:56 | 07:52 | 20:11 | 10:37 | 22:56 | 11:37 | 23:56 | 06:52 | 19:11 | 05:52 | 18:11 | 08:52 | 21:11 | 09:52 | 22:11 | 08:22 | 20:41 | 09:37 | 21:56 |